

# Leys størv

### Skrivstovufólk til Kollafjarðar skúla

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Kollafjarðar skúla at arbeiða 10 tímar um vikuna. Starvið verður at seta skjótast til ber.

Førleikakrøv: Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Setanarviðurskifti: Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir við avritum av próvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 1. mars 2007, kl. 12.00.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Karina Hammer, skúlaleiðara á tlf. 302553 ella Jákup Simonsen, mentamálaleiðara á tlf. 302010.

### Hjálparfólki til Frítíðarskúlan í Hornabø

Søkt verður eftir einum hjálparfólki, fyri hjálparfólk í farloyvi, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Starvstíðin er fram til 1. januar 2008.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 100 Tórshavn, í hendi seinast mánadagin 5. mars 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ann-Elisabeth Joensen, stovnsleiðara, tlf. 320891 ella 214467.

### Sjúkra- og feriuavloysari til Stella Maris vøggustovu

Søkt verður eftir einum sjúkra- og feriuavloysara at byrja skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Stella Maris vøggustovu, Varðagøta 11, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi leygardagin 24. februar 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Eldevig, stovnsleiðara, tlf. 312853 / 212853.

### Pedagogur og hjálparfólk til Frítíðarskúlan Smílibýlið

Søkt verður eftir pedagogi og hjálparfólki, at arbeiða ávikavist 30 og 20 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2007 ella eftir nærri avtalu.

Starvstíðin fyri farloyvisstarvið er fyribils fram til 15. august 2007.

Setanarviðurskifti: Starvið sum pedagogur verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn í hendi seinast mánadagin 26. februar 2007.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til til Barbaru Dahl, stovnsleiðara, tlf. 214879 ella Joan Heinesen, varaleiðara, tlf. 210646.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

## Frítíðaravloysarar

- **Deild A kirurgisk songjardeild**
- **Deild M medisinsk songjardeild**

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuatstøðingar/sjúkrahjálparar**

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum á songjardeildunum A og M í tíðarskeiðnum **01. juni 2007 til 31. august 2007.**

**Anæstesideildin**
Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing til anæstesideildina frá **1. juni 2007 til 31. august 2007** ella eftir nærri avtalu.

Neyðugt er við serútbúgving sum anæstesisjúkrarøktarfrøðingur.

**Skurðgongin**
Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing til skurðgongina frá **01. juni 2007 til 31. august 2007** ella eftir nærri avtalu.

Neyðugt er við kunnleika og royndum innan økið.

**Nærri fæst at vita um størvini frá:**
Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, tlf. 454545 lokal 106 ella teldupostur: fyristodukvinna@ks.fo

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

*Umsókn, saman við prógvi og autorisatión, verður at senda til:*
**Klaksvíkar Sjúkrahús,**
att. Umsjónarmaðurin,
FO-700 Klaksvík

***Umsóknarfreist 23. mars 2007***

---


# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mánadagin **19. februar kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**





---

**Atlanticpane** P/F
Tlf.: 42 14 05 • Fax 42 16 02

## Fólk søkist

Kundi tú hugsað tær at verði ein av okkara.
Vit sóknast eftir einum fólki at arbeiða hjá okkum. Byrjast kann beinanvegin. Arbeiðið er fjølbroytt, bæði innan- og uttandurða. Vit framleiða termorútar og alt innan glas / spegl og innrammingar.

Vit ynskja tú hevur:
- Góðan samstarvsvilja
- Ábyrgdarfull/ur
- Arbeiða sjálvstøðg/ur
- Góða uppmøting
- Koyrikort

um so er send okkum nakrar reglur.

**Atlanticpane P/F**
Postsmoga 30
410 Kollafjørður

---

## Aðalfundur hjá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags

Aðalfundur grunnsins verður **leygardagin 17. mars kl. 15.00** í B36-húsinum í Gundadali, Tórshavn.

**Dagsskráin:**
- Sambært viðtøkum grunsins,
- Møgulig lógarbroyting

**Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags**


Lesið Sosialin -tað loysir seg


